SOSIALURIN

Blaðstjórn:
Vilhelm Johannesen,
Fyribils ábyrgdarstjóri,
tlf. 5 5873, Klaksvik

Prentstaður:
Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 1 1820
Tórshavn

Tað er ikki loyvt at avfotografera lýsingar og myndir úr SOSIALINUM til nýtslu í øðrum bløðum uttan loyvi frá ábyrgdarblaðstj.

ÓLAVSØKA

KRING FØROYA LAND — og fyri tað eisini kring allan knøttin, situr mong kvinna og maður uppundir Ólavsøku og hugsar um teir farnu dagar, tá Ólavsøkan setti sín dám á lív teirra, og var stevnumiðið hjá unglingi sum eldri. Tað er við sorgbliðum kenslum, at mangur letur tankarnar leita fram til farnar Ólavsøkur. Men hóast tíðirnar eru broyttar so ómetaliga, so er Ólavsøkan hin sama.

TAÐ ER HØVUÐSSTAÐIN, sum vit leita til á Ólavsøku, staðurin sum ber søgu okkara í sær. — Har sært tú enn tær gomlu gøturnar, sært í huganum, hvussu teir gomlu títaðu aftur og fram, slóu ring og prátaðu og hildu sær at gamni.

SJÁLVT UM tú ikki í ár dugir at skilja, at Havnin skal vera so nógv broytt, so fært tú aftur at kenna, at hin gamla Ólavsøkan ikki letur seg goyma burtur í skugganum av tí nýggja, hon hevur snøgt sagt einki latið frá sær, hon hevur tvørturímóti tikið meiri og meiri til sín — í øllum Norðanlondum er Ólavsøkan tað einasta, sum ár undan ári savnar til tjóðarstevnu — øld eftir øld.

NÚ BÁTUR í bát aftur stevnur inn á Havnarvág — og bilur í bil fer stiklandi eftir oynni oman í Havnina, er bara at ynskja góðar Ólavsøkudagar í tí Havnini, sum ikki er føringi fremmand. Man ikki tað orðið aftur fara at sannast: »*Tú vermir mítt hjarta, tú ert mær so kær...*«.

VÆLKOMIN Á ÓLAVSØKU!

Spinnið í Gøtu

tygum fáa gott tógv, og skjóta avgreiðslu.

Vit keypa óvaskaða og vaskaða ull og selja øll sløg av føroyskum tógvi.

TØTINGARVIRKIÐ

v/ Ólavur Gregersen — tlf. 20 í Gøtu

Svimjihylurin

verður stongdur Ólavsøkuaftan kl. 10.00 Opin aftur mánamorgunin kl. 7.00.

BÝRÁÐIÐ

Dagbókin

Ólavsøkutingsetan verður sett Ólavsøkudag kl. 13.00 aftaná kirkjugongdina í Havnar kirkju.

Aftaná kappróðurin Ólavsøkuaftan um kl. 17.00 verður hild in almennur fundur á Føroya Fólkaháskúla. Robert Joensen heldur ræðu.

Umboðsmenninir fyri teir ymisku flokkarnar á tingi, sum hava verið í Íslandi á vitjan eftir innbjóðing frá Altinginum, komu aftur hósdagin sein asta. Tingmenninir vitjaðu ymisk virki og stovnar í Reykjavík, vóru á Bessastøðum, har teir hittu Kristjan Eldjarn, forseta, eisini vóru gjørdar útferðir á Hornafjørð, til Tingvellir, Búrfell og Krísuvíkar.

Í kappróðrinum um Føroyameistaraheitið seinasta sunnudag á Skálafirði, luttóku bert 5 bátar, tríggir gentubátar og tvey áttamannafør. Av gentubátunum vann Tjaldrið, NSÍ, 2. Royndin Fríða, Vágur og nr. 3. Dúgvan, Sørvágur. Av áttamannaførunum vann Gøtu Tróndur og nr. 2. Lorvíkingur. Skálabáturin er føroyameistari av 10-mannaførunum og Skurð in úr Gøtu er føroyameistari av dreingjabátunum. Til kappróðurin um føroyameistaraheiðið høvdu 17 bátar kvalifiserað seg.

Ríthøvundakvinnan Tove Kjær boe vitjar í hesum døgum Føroyar, hon hevur vitjað her áður, fyrstu ferð í 1946, og var hon sera hugtikin av ferðini.

Mánadagin komu 2 úrvalslið úr Roskilde at vitja Havnar Fimleikarfelag. Umframt sýningar í Havn um Ólavsøkuna, fara fimleikarnir út á bygd, og verða útferðir gjørdar. Roskilde-fimleikararnir fara heimaftur 31. juli.

Pison er heimkomin úr New Foundlandi.

Ógildislýsing

Burturmistir lutaseðlar í HAPPADRÁTTINUM

Í dráttunum 30. august, 16. oktober og 4. desember 1972 verða vinningar ikki útgoldnir uppá hesar sellar:

1/1	½	¼
nr. 2020	nr. 1789 A+B	nr. 405 A
nr. 2021	nr. 1790 A	nr. 406 C
nr. 2022	nr. 1940 A+B	nr. 410 D
nr. 2023	nr. 1941 A+B	nr. 456 A
nr. 2036	nr. 1942 A	nr. 457 D
nr. 2037	nr. 1943 A+B	nr. 687 C
nr. 2039	nr. 1944 A+B	nr. 1404 D
nr. 2176	nr. 1948 A	nr. 1405 C+D
nr. 2177	nr. 1949 A+B	nr. 1406 D
nr. 2178	nr. 1950 A+B	nr. 1407 D
nr. 2179	nr. 1995 A+B	nr. 1412 A
nr. 2180	nr. 1996 A+B	nr. 1419 C
nr. 2701	nr. 1997 A+B	
nr. 2702		
nr. 2703		
nr. 2704		
nr. 2705		
nr. 2706		
nr. 2707		
nr. 2708		
nr. 2709		
nr. 2710		

Tórshavn, 17. juli 1972.

FØROYA LANDSSTÝRI
(Happadrátturin)

Íbúð søkist

Vit sóknast eftir íbúð í Havn ella nærindis.

Hervør og *Bárður Jacobsen*
tlf. 11683

Hondbóltsfeløgini *Neistin* og *Kyndil* í Havn hava í hesum døgum vitjanir av tveimum donskum hondbóltfeløgum, Bolbro úr Odense og Vejle Boldklub. Liðini bæði spæla í 2. divisjón. Um Ólavsøkuna verða hesir dystir spældir. Ólavsøkuaftan: Býliðið úr Havn —Bolbro/Vejle. Ólavsøkudag: 1. manslið hjá Kyndil—Bolbro. 1. manslið Neistin—Vejle. Donsku hondbóltsspælarnir verða í Føroyum til 2. august.

Føðingardagur. Sunnudagin 30. juli verður Johannes Hansen, á Kjalnesi, Kollafjørð, 70 ár.





REIÐARAVIRKI
HEILSØLA
Kolonial & útgerð

HERMETIKK
TIMBURHANDIL
KLÆÐNABÚÐ
SLEIPISTØÐ
SHELL-AVGREIÐSLA

DEILDIR:

SKÁLA SKIPASMIÐJA & HANDILSVIRKI, SKÁLA
Skipasmíð . Turkivirki . Handil

HANDELSHUSET PESCADERO A-S
Strandgade 27A . København K
Tlf ASTA 1830 . Telex 5290

Pf. J. F. KJØLBRO
Klaksvík . Føroyar
Telefon 5489 . Telex 20
Telegramadr.: Kjølbro Klaksvík

LASSE SØRENSEN: »TEGNINGER FRA DEN FÆRØSKE NATUR«

LASSE's fugle og naturtegninger m. originaltekst (bl. a. kendt fra Dimmalætting) er nu kommet i bogform. Denne smukke indbundne bog bør stå i ethvert færøsk hjem. DEN IDEELLE GAVEBOG.

Klip her — Klip her

TRYKSAG

KLIP UD OG SEND dette kort (udenfrimærke), så sender vi omgående Lasse's »TEGNINGER FRA DEN FÆRØSKE NATUR« (indbundet) pr. efterkr.
Undertegnede ønsker ☐ stk. »TEGNINGER FRA DEN FÆRØSKE NATUR« tilsendt pr. efterkrav. Pris kr. 42 + porto.

Navn:

Adresse:

Reservéret postvæsenet

Forlaget Tusela
3812 SØRVÁG

Postbesørgets ufrankeret (Modtageren betaler) porto

60